Lagt til rættis: Dagfinn Olsen

# Elton John kendi til Føroyar og Five Star Entertainment



Nú tíðin nærkast til at enska heimsstjørnan Elton John fer á pall í Føroyum, eru tað fleiri sum spyrja seg sjálvan, hvussu tað ber til at fáa slíkar heimsstjørnur, sum eru vanar við at framføra fyri 10tals túsund áskoðarum, at koma til Føroyar at hava konsert. Sosialurin hevur tosað við ein av fyrireikarunum Dennis Holm frá Five Star Entertainment.

Dennis greiðir frá, at Five Star í eina tíð hevur roynt at fingið í lag fund við persónliga umboðsmannin hjá Elton John. Og hetta eydnaðist so í september í fjør. Og at tá okkara umboðmaður fór á fund við persónliga umboðsmannin hjá Elton John, so gjørdist hann eitt sindur bilsin um, at teir vistu um Føroyar og um Five Star Entertainment.

Umboðsmaðurin hjá Elton John greiddi frá, at dótturin varð gift í New York fyrr í summar (2009) og í brúðleypinum var eisini guitarleikarin hjá Bryan Adams, Keith Scott. – Og har hevði Keith Scott fortalt um, at teir við Bryan Adams høvdu verið eitt fantastisk stað í fjør (2008), tá teir spældu í Føroyum. Eitt fantastiskt land og fólkini vóru ótrúliga vinarliga og fyrikomandi, og ikki minst, so var alt rundan um konsertina í topp, hevði Keith Scott greitt frá.

Og eg trúgv, at júst hetta, hevur verið heilt avgerandi fyri at Elton John nú kemur til Føroyar at spæla, sigur Dennis Holm.

– Tí fundurin við umboðsmannin hjá Elton John gekk gott og innan stutta tíð vóru tey stóru tingini uppá pláss, eftir var bara at fáa eitt dato, sum passaði inn í restina av Evropa-ferðini hjá Elton John, og tað bleiv so til týsdagin 29. juni, sigur Dennis Holm.

## Elton John konsertin stóran áhuga uttanlands

Um ein lítlan mánað verður stóra konsertin við Elton John á Tórvølli. Atgongumerki til konsertina hava verið til keyps síðan 15. apríl og fyrireikarnir siga, at umframt heilt stóran áhuga í Føroyum, so er tað eisini stórur áhugi fyri Elton John konsertini uttanlands.

Dennis Holm frá Five Star Entertainment sigur, at nógv fólk úr Íslandi og Danmark koma til konsertina.

- Og vit hava eisini fingið nógvar teldupostar úr Onglandi, har spurt verður eftir hvussu tey kunnu keypa atgongumerkir og um hvussu man ferðast til Føroyar. Eitt sindur merkisvert er eisini, at fólk koma heilt úr Brasilia til konsertina. Annars hava fólk úr grannalondum okkara eisini ringt til okkum við alskyns spurningum, bæði við ynskjum um at vit skulu hjálpa teimum at møta Elton John, og um meiri praktisk ting, t.d. hvussu man kann keypa atgongumerkir so tætt við pallin sum gjørligt, sigur hann.

Okkurt bendir á, at tað at konsertin í Føroyum er einasta solo-konsertin á Evropaferðini hjá Elton John í summar, ger, at fólk velja at ferðast eftir júst hesari konsertini. Men tað eru eisini fleiri sum vísa á, at tey ætla at brúka hetta høvið til at vitja Føroyar, sigur Dennis Holm at enda.

## Nógv útgerð uttanlands til Elton John konsertina

Tað verður týsdagin 29. juni, at Elton John fer á pall á Tórsvølli. Konsertir við heimsnøvnum, sum Elton John, seta sum verða man sera stór krøv til fyriskipan. Bogi Andreasen frá Five Star Entertainment sigur, at arbeitt hevur verið við fyrireikingunum síðan miðskeiðis í mars mánaða. Og tá man hyggur eftir tí langa listanum við krøvum til ljóð og ljós útgerð, pall og eina rúgvu av øðrum viðurskiftum kring konsertina, so gerst man eisini greiður um, at tað krevur nógv at fyriskipa ein so stóra konsert, sigur Bogi Andreasen.

Til dømis koma tveir trailarar og ein stórur vøruvognur til Føroyar í døgunum undan konsertini. – Har ímillum er eisini tað stóra pianoi hjá Elton John. Tá øll hjálparfólkini hjá Elton John koma til Føroyar, hava tey eisini heilt nógv viðføri við í flogfarinum, bæði viðføri, sum Elton John skal brúka og ymiskt sum skal brúkast á Tórsvølli í samband við konsertina.

## Onnur stóra konsertin á Tórvølli

Tá Elton John fer á pall á Tórsvølli týskvøldið 29. Juni er tað onnur stóra konsertin, sum Five Star Entertainment hevur á Tórsvølli. Fyrra konsertin var sum kunnugt við Bryan Adams, tá 5.750 fólk vóru til eina útselda konsert við kanadisku stjørnuni. Til konsertina við Elton John eru pláss fyri 6.500 fólkum á Tórsvølli og ein av orsøkunum er, at vit hava broytt uppsetingina á Tórsvølli, sigur Bogi Andreasen frá Five Star Entertainment.

Til konsertina við Bryan Adams stóð pallurin í norðara horni og var vøllurin so býttur upp, soleiðis at vit brúktu eina góða helvt til konsertøkið, umfram áskoðararplássini á eystaru og vestaru síðu. Nú verður pallurin mitt á vøllin og kemur pallurin at hava front ímóti áskoðaraplássunum á eystarusíðu, undir Høllin á Hálsi, sigur Bogi Andreasen.

Hetta ger, at vit hava eitt sindur betri pláss og ikki minst eru nakað fleiri áskoðarapláss.

Eins og við Bryan Adams konsertini, so verður gólv lagt á Tórsvøll og girðingar settar upp kring vøllin. Konsertøkið verður annars skipað við sølubúðum á báðum síðum frá pallinum og aftur til áskoðaraplássini.